UMMÆLI

# Ein samrøðustartari at lesa saman

Strikurnar eftir Dánial Hoydal og Anniku Øyrabø

*Solveig Hanusardóttir*

## INNLEIÐSLA

Fyrstu ferð eg fekk *Strikurnar* í hendurnar, fekk eg beinanvegin kensluna av, at okkurt skelkandi var í væntu. Á bókarpermuni rísur eitt stórt og óhugnaligt trøllaandlit úr havinum. Framman fyri trøllið stendur eitt barn við bakinum móti okkum. Allir litirnir eru sognir úr náttúruni, men drongurin lýsir upp í strípútari troyggju og við reyðum ryggsekki. Gula hárið fýkur í allar ættir av rokilsinum frá trøllinum. Stórur kontrastur er millum bjørtu og monokromu litirnar, tað óhugnaliga og óskyldiga. *Strikurnar* stendur við útskornum bókstavum uppi yvir trøllinum. Strikur plaga ikki at vera so farligar, men her er okkurt áfatt. Vandi er á ferð. Einasti máti at finna út av, hvat gongur fyri seg, er at seta seg at lesa. Og her er okkurt serstakt í væntu.

## SØGAN

Bókin byrjar við, at vit hitta tann ljóshærda drongin við reyðum ryggsekki og vinmannin, sum eitur Høgni. Teir báðir fylgjast í skúla og spæla saman. Ein dagin, tá drongurin kemur heim, hevur mamman eini syrgilig boð til hansara: abbi er deyður. Komandi dagarnir eru tungir og daprir. Og brádliga hugsar hann bara um strikur. Hann má ikki traðka á strikurnar millum flísar, so hann hoppar tvørtur um tær. Hann fær ikki sovnað av øllum strikunum, sum eru í loftinum uppi yvir songini. Strikurnar gerast ein byrða og ávirka hansara atburð í gerandisdegnum. So mikið nógv, at Høgni og drongurin ikki smílast til hvønn annan longur, og til endans tímir Høgni ikki at spæla við hann. Mamma drongin sær, at okkurt er áfatt. Tey bæði práta um støðuna, um abban og missin, og tað hjálpir. Stutt eftir eru strikurnar ikki líka farligar longur. Lagið gerst betri, tey fara oman til sjóvarmálan at hugna sær, og Høgni kemur við.

## UM BÓKINA

*Strikurnar* er eitt samstarv millum høvund Dánial Hoydal og myndprýðara Anniku Øyrabø. Bókin varð útgivin á Bókadeild Føroya Lærarafelags í 2022, og hetta er onnur bókin, sum tey bæði hava gjørt í felag. Tann fyrsta bókin eitur *Abbi og eg og abbi*, og varð útgivin í 2021. Hon snýr seg um ein drong, hvørs abbi fer at gloyma. Eg ummældi hana í undanfarna Varða, og eg hevði jalig orð at bera henni.

*Strikurnar* snýr seg um tvingsilstankar, sorg og vinalag. Málbólkurin er rættiliga breiður. Børnini, sum lesa søguna, mugu hava eitt ávíst abstraktiónsniveau fyri at skilja avbjóðingarnar hjá dronginum, so hon hóskar seg best til størri børn. 4 ára gamla soni mínum dámar væl at lesa *Abbi og eg og abbi*, men *Strikurnar* er ov torgreidd til hansara. Eitt, sum spælir inn, er, at í fyrru bókini rakar trupulleikin abban, og hetta er nakað, sum vit kunnu seta í frásjón til eldri ættarlið í familjuni, meðan tvingsilstankarnir raka høvuðspersónin í bókini *Strikurnar*, og hetta er torførari at lýsa og skilja. Tað er eisini týðiligt í myndprýðingini, sum eg skrivi meira um seinni. Bókin er 34 síður, og teksturin fyllir ikki nógv á myndprýddu opnunum. Á tann hátt líkist bókin einari barnabók, men ung kunnu sanniliga eisini hava gott av at lesa hesa einføldu og poetisku endurgevingina av einum samansettum og tyngjandi evni. Bókin egnar seg serliga væl at vera lisin saman við onkrum. Tekstur og myndir skapa hugasambond, sum kunnu vera grundarstøði til góðar og gevandi samrøður.

UM TEKSTIN

Drongurin er frásøgufólkið í søguni, og teksturin er skrivaður úr hansara sjónarhorni. Drongurin greiðir frá sínum avbjóðingum við orðum og orðingum, sum svara til hansara aldur. Vit fáa ikki at vita, hvussu drongurin eitur. Og stóran part av bókini er einki, sum avdúkar, um eg-persónurin er ein drongur ella ein genta. Og kynið er sum so eisini óviðkomandi, tá hugsað verður um evnið, sum kann ávirka øll.

Setningarnir eru hegnisliga uppbygdir, og flestu teirra eru stuttir. Endurtøkur undirstrika kjarnan í frásøgnini. Eitt dømi er, tá drongurin fortelur um vandan við strikunum:

“Strikurnar eru farligar. Alt broytist, tá tú fert yvir um eina striku. Tú mást vera øgiliga djarvur at fara yvirum. Men tær eru eisini góðar. Tí um tú fert fýra ferðir yvir um strikurnar, so verður alt sum fyrr. So um tú bara minnist til altíð at fara fýra ferðir yvirum, so gongur tað nokk. Fýra ferðir. Hvørja ferð.”

Orð og setningar verða endurtikin fyri at undirstrika álvarsemið, og so við og við verður trupulleikin hjá dronginum lýstur gjøllari. Nógvu, stuttu setningarnir gera, at lesiupplivingin nærum speglar, hvussu strikurnar fylla í høvdinum á dronginum.

Ein onnur endurtøka er, tá drongurin og Høgni hyggja at hvørjum øðrum og smílast. Á opnu nummar tvey er ein nærmynd av andlitunum á dreingjunum, har teir smílast til hvønn annan.

“Høgni hyggur at mær og smílist. Eg hyggi at Høgna og smílist.”

Sorgin verður eisini størst, tá teir ikki smílast til hvønn annan longur.

Høgni sigur, at hann ikki tímir at spæla við drongin, tí hann uppførir seg so merkiligt. Tá stendur:

“Vit kunnu ikki hyggja upp á hvønn annan og smílast. Nú hyggja vit og vita ikki, hvat vit skulu gera.” Á seinastu opnu, tá teir aftur spæla saman, smílast teir aftur. Eg fekk ikki latið vera við at smílst, tá eg las tekstin. Teksturin og myndin eru so einføld, men samstundis eitt úttrykk um, at tvingsilstankarnir eru við at hvørva, og at hann vendir aftur til at hava tað gott og sunt sálarliga.

UM MYNDIRNAR

Í *Abbi og eg og abbi* gerst náttúran livandi, tá fjøllini fáa nøs og eygu, og støðan hjá tí demensrakta abbanum verður lýst á skemtiligan og sigandi hátt við til dømis at vísa innihaldið í køliskápinum, har tað bæði er matur, men eisini ein fjarstýring og einar brillur.

Í bókini *Strikurnar* hevur Annika Øyrabø havt eina aðra tilgongd, har strikur og endurtøkur eru berandi. Myndliga endurgevingin av tvingsilstankunum, er sera væl eydnað. Tað er lættari hjá børnum at skilja, at okkurt er galið, tá abbin leggur brillurnar í køliskápið, og tá drongurin er keddur, eru myndirnar sorgblíðar. Í *Strikunum* lýsir Annika Øyrabø bæði sorgina og tað mentala kaosið á ein meira úrtøkiligan og beinraknan hátt. Monokrom mynstur verða brúkt sum bakgrund og í nógvum staklutum, tá ið tankarnir hjá dronginum gerast tungir. Til dømis eru listaverkini, sum hanga í stovuni, svørt, grá og hvít mynstur. Tá Høgni spyr, hvat er galið, er regnið í bakgrundini skákgangandi strikur, og gongubreytin snórabeinar flísar.

Spenningurin í søguni er hægst í myndini, sum eisini er permumynd. Hetta er, tá drongurin er ringast fyri. Høgni hevur sagt, at hann ikki tímir at spæla longur. Strikurnar verða til eitt stórt og óhugnaligt trøll, ið nærum gloypir dronginum – og vit lesarar síggja, hvussu ágangandi strikurnar eru blivnar. Mamman veit, at okkurt er áfatt. Tey seta seg andlit til andlits, og hann leggur sínar stúranir á hennara herðar.

Í *Abbi og eg og abbi* er tað eisini mamman, sum er vegurin út úr tí dapra. Ein rámandi og einfaldur lærdómur er, at tað hjálpir at seta orð á teir truplu tankarnar, sum tyngja. Ein lætnandi endurloysing er í myndunum, tá mamman og drongurin hava tosað saman. Tær monokromu strikurnar og litirnir hvørva. Bjartir og glaðir litir taka yvir, sólin skínur, drongurin og mamman klemmast, hugna sær og hava tað gott. Seinasta opnan er ein mynd av Høgna og dronginum í fjøruni. Teir smílast til hvønn annan. Teir hava fangað krabbar og marflugur, savnað skeljar og spælt - uttan tyngjandi tankar um strikur yvirhøvur.

BÓKIN SUM BÓT

*Abbi og eg og abbi* var tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2022 og vann Vestnordisk Råds børne- og ungdomslitteraturpris sama ár. Í ár, 2023, er *Strikurnar* tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Eg skilji væl, at bøkurnar eru tilnevndar slíkar heiðurslønir, tí tær eru nakað heilt serstakt. *Abbi og eg og abbi* og *Strikurnar* eru einfaldar og stuttar søgur, sum viðgera fjøkjalig evni og stórar spurningar. Samansetingin av orðum og myndum ger, at tað ber til at seta orð á nógv uttan at brúka serliga nógv orð.

Annika Øyrabø og Dánial Hoydal hava sagt frá, at fleiri bøkur eftir ætlan verða útgivnar um torfør evni, sum fylla hjá børnum og ungum, nevniliga kropsfatan og skíggjanýtsla.

Alt hevur tíð sína – at lesa bøkur um dinosauravinir, sum svimja kapp, ella froskar, sum fara út í rúmdina, er stuttligt og undirhaldandi. Men størri og álvarsom evni hava eisini sítt pláss í barnabókum. Lýsingin av einari truplari støðu í sjálvum sær er týdningarmikil og ger børn klókari og gevur størri innlit á ein hátt, sum einki annað tekstaslag kann.

Um eitt barn hevur tað torført við onkrum, kann støðan setast í frásjón við at lesa eina bók um onkran, sum hevur tað júst sum ein sjálvur. Søgurnar kunnu eisini brúkast til at greiða frá onkrum, sum ein vinur ella floksfelagi fer ígjøgnum. Aloftast enda søgurnar væl, og tað er við til at vísa, at

støðan fer at batna – sjálvt um tað ofta er eitt sindur meira samansett í veruleikanum. Miðilin hevur týdning: lesiløtan er gevandi. At vera burtur í bókini, sum tú hevur í hondunum, antin sjálvi ella saman við einum. Bókin er løtt at finna fram aftur, og lesarin ger sjálvur av, hvussu leingi hann ella hon lesur. Um tey hava hug at dvølja við okkurt, venda aftur til okkurt annað ella hoppa okkurt triðja um, ber tað til.

Tvingsilshugsanir verða aktiveraðar, tá børn kenna seg hjálparleys og missa tamarhaldið á tilveruni. Tey royna at krøkja seg í okkurt, sum gevur struktur. *Strikurnar* snýr seg um ein drong, sum hevur tvingsilstankar – uttan at brúka tað orðið. Og bókin vísir, at tað er strævið, at tað ikki er ónormalt, og at støðan kann gerast betri.

Bæði *Abbi og eg og abbi* og *Strikurnar* eru stuttar samrøðubøkur, sum kunnu seta hol á eitt evni, uttan at fara ov djúpt ella greinandi til tað. Hjá børnum er lættari at skilja eina søgu enn okkurt abstrakt, sum til dømis ein faldara um demens. Við gjølla valdum orðum og myndum fáa vit lýst eina sálarstøðu heldur enn eina allýsing av einari diagnosu.

*Strikurnar* er ein álvarsom og góð barnabók. Hon er ein sigandi og einføld lýsing av, hvat tvingsilstankar kunnu vera. Vavið leggur upp til, at samrøðan heldur fram, tá bókin er lisin. Tað er týdningarmikið at geva sær ta tíðina, sum søgan og myndirnar krevja, fyri at fáa sum mest burtur úr lesiupplivingini. Um tú gevur tær stundir og kanska lesur hana meira enn eina ferð, fært tú fragdina av nærlagninum, sum Annika Øyrabø og Dánial Hoydal hava lagt í hesa rørandi bók.